Petur Eirik Djurhuus, PE Kolonial:

# - Selja nógv ósunt til jóla

PE Kolonial og Samkeyp hava í ár valt at gera nógv burtur úr at hava nógv tilboð á sjokulátavøru og øðrum góðgæti undan jólum. Petur Eirik Djurhuus, ið eigur og rekur PE Kolonial á Hálsi í Havn, sigur, at sølan í ár líkist undanfarnum árum.

- Tað eru okkurt um 20-25 prosent av samlaðu góðgætissøluni, ið verður selt seinasta hálvanannan mánaðin av árinum. Tað verður eisini selt rættuliga nógv sodavatn hesa ársins tíð, og sum heild kann sigast, at vit selja nógv ósunt undan jólum, sigur Petur Eirik Djurhuus.



*Petur Eirik Djurhuus, sum eigur og rekur PE Kolonial , sigur, at sølan av karamellum og sjokolátu í ár líkist søluni undanfarin ár*

*Mynd: Terji Nielsen*

Stjórin í PE Kolonial sigur, at hjá teimum hevur Quality Street selt best higartil í ár, men ein orsøk til tað kann verða, at Samkeyp hevur lýst við júst hesum karamellunum seinnu vikurnar, og tað heldur Petur Eirik Djurhuus ger mun.

Petur Eirik Djurhuus sigur, at tað serliga eru karamellirnar, ið verða nógv seldar, men eisini gongur væl við søluni av sjokulátaplátum og vanligum bommpakkum.

# - Lítil vinningur á karamellum

Eitt av stóru sølustøðunum av góðgæti í høvuðsstaðnum er Føroya Keypssamtøka í Hoyvík. Bent Lundsgaard, deildarleiðari í FK, sigur, at tað fyrst og fremst eru karamellirnar, sum nógv verður selt av undan jólum, men eisini onnur sløg av góðgæti selja væl, sigur hann. Umleið ein fjórðingur av árligu góðgætissøluni hjá FK verður seldur seinastu seks vikurnar av árinum.

- Marsipan og bleytt nougat hoyra jólunum til, og tí gongur tað eisini rættuliga væl. Síðani er tað alt hetta serliga jólagóðgæti, so sum sjokulátanissur og annað, ið nokk so fitt verður selt av, sigur Bent Lundsgaard. Hann greiðir frá, at hóast nógv verður selt av karamellum, so er tað ikki nakað, sum gevur Føroya Keypssamtøku yvirflóð av pengum, tí vinningurin er sera lítil á karamellum. Bent Lundsgaard sigur, at skal man taka dagar millum tey trý stóru sløgini av karamellum, so er tað Quality Street, sum selur best í ár.

**tn**



*Bent Lundsgaard, deildarleiðari í FK, framman fyri nøkrum av vælumtóktu karamellunum*

*Mynd: Terji Nielsen*

# 50 tons av karamellum til føroyingar

**Hetta er tíðin, tá ið vælumtóktu karamelldósirnar ganga títtar um handilsdiskin. Tað eru serliga trý sløg av karamellum, sum fólk fara eftir, og kappingin millum hesi sløg er hørð. Hvussu nógvar karamellur verða seldar til jóla, vilja innflytararnir ikki upplýsa, men talan er um nógv tons**

KARAMELLIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Ejler Johannesen, sølumaður hjá Poul Hansen, sigur, at umleið 97 prosent av øllum Quality Street karamellum, ið verða seldar í Føroyum, verða seldar stutt undan jólum.*

*Mynd: Terji Nielsen*

Føroyingum hava altíð dámt serstakliga væl ensku karamellirnar, og einki bendir á, at hetta er við at broytast. Serliga eru tað tey trý sløgini, Quality Street hjá Nestle, og Roses og Heroes hjá Cadbury, sum fólki dámar væl. Tað eru ávíkavíst Poul Hansen og Damfar, sum innflyta hesar karamellur.

### Trý kilo til hvørt hús

Innflytararnir vilja ikki upplýsa, hvussu nógv verður innflutt av karamellum árliga, men sum skilst, etur hvørt einstakt føroyskt húski einar tvær dósir árliga. Tvær dósir svara til umleið trý kilo av karamellum. Í Føroyum eru gott og væl 17.000 húsarhald, og tað vil siga, at vit føroyingar eta gott og væl 50 tons av karamellum árliga.

Hjá Damfar, sum innflytir Roses og Heroes karamellirnar hjá Cadbury, verður sagt, at nýtslan hesi seinnu árini hevur verið rættuliga støðug, men annars hava tey ikki hug til at upplýsa stórvegis um karamellirnar.

Tað er Poul Hansen, sum innflytir Quality Street karamellirnar hjá Nestle. Ejler Johannesen, sum hevur ábyrgdina av góðgætissøluni hjá Poul Hansen, sigur, at okkurt um 97 prosent av øllum karamellunum, sum fyritøkan selur, verða seldar til jóla. Hini trý prosentini verða seld skipum alt árið.

Ejler Johannesen sigur, at sølan er minkað eitt lítið sindur seinnu árini. Fyrr vóru sløk trý kilo í hvørjari dós, men nú er bert 1,3 kilo av karamellum í hvørjari Quality Street dós. Hetta hevur havt við sær, at nøgdin av seldum dósum er vaksin, men samlaða kilotalið er minkað nakað, sigur Ejler Johannesen.

Tað er hørð kapping um karamellukundarnar, og innflytararnir eru eisini ógvuliga trekir at koma við upplýsingum. Tað ræður um ikki at keypa ov nógv inn, so at man hevur eina rúgvu eftir, tá ið jólini eru farin aftur um bak, men samstundis er eisini umráðandi at hava nóg mikið á goymslu, siga innflytararnir.

# Føroysk heilsukunning á netinum

**Í dag almannakunngjørdi Apoteksverkið nýggju heimasíðuna hjá sær, ið hevur eina rúgvu av møguleikum at bjóða brúkarunum. Til ber at finna allar møguligar upplýsingar um sjúkur, sjúkutekin og heilivág, og eisini ber til at seta spurningar um heilsu á heimasíðuni.**

NÝGGJ HEIMASÍÐA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan er ivaleyst um eina av mest umfatandu føroysku heimasíðunum nakrantíð. Á www.apotek.fo ber nú til at fáa sær alskyns kunnning um heilsu, heilsuverk, heilivág og annað, sum hevur við hetta at gera.

### Ein liður í kunning um heilsu

Richard Schwartson, apotekari, er ein av teimum, sum hetta seinasta hálva árið hevur arbeitt við at fyrireika nýggju heimasíðuna, og hann er fegin um úrslitið.

- Vit meta, at síðan er og verður í enn størri mun ein liður í kunning um heilsu í Føroyum. Samfelagið í dag er soleiðis bygt upp, at fólk vilja hava kunning her og nú, tá ið tey hava tørv á tí, og í hesum sambandi er alnótin helst besti miðil til kunning, sigur Richard Schwartson.

Kunning á nýggju heimasíðuni er rættuliga umfatandi. Greitt verður frá ymiskum sjúkum, og hvørji eyðkenni eru fyri hesar sjúkur. Somuleiðis ber til at lesa um ymsan heilivág, og hvør heilivágur verður nýttur fyri hvørjar sjúkur. Kennir tú teg illa til passar, ber til at fara inn á heimasíðuna og við at upplýsa tíni sjúkueyðkenni, kanst tú møguliga finna fram til, hvat bagir tær.

### Spyr apotekaran ella læknan

Ein møguleiki við nýggju heimasíðuni, sum nógv ivaleyst fara at gera sær dælt av, er, at tað ber til at seta fakfólki spurningar. Tú kanst til dømis spyrja um ymiskt viðvíkjandi heilivági, so sum prís, hjáárin og annað. Eisini kanst tú sum brúkari seta spurningar viðvíkjandi heilsu. Í fyrstu atløgu roynir apoteksverkið sjálvt at svara spurningunum, men er talan um so mikið umfatandi spurning, at tað krevur svar frá lækna, verður hetta eisini gjørt.

- Spurningarnir verða allir svaraðir, og eitt fólk kannar dagliga, um nakar nýggjur spurningur er settur. Vit ætla, at tað í mesta lagi skal taka tvær vikur at fáa ein spurning svaraðan, og helst styttri enn so, sigur Richard Schwartson. Spurningarnir, ið verða settir, verða ikki sjónligir á heimasíðuni, fyrr enn teir eru svaraðir av fakfólki.



*Fýra av fólkunum, ið hava verið við til at gjørt nýggju heimasíðuna hjá apoteksverkinum. Frá vinstru eru tað Beinta Hilduberg og Daisy Sloan frá apotekinum, Elin Michelsen frá Sansum og Richard Schwartson frá apotekinum.*

*Mynd: Terji Nielsen*

Arbeiðið við at gera heimasíðuna hevur tikið umleið eitt hálvt ár, og í sambandi við hetta arbeiði hevur apoteksverkið havt ein arbeiðsfólk við fýra persónum, ið hava fingist við hetta. Tað er lýsingarstovan Sansir, ið hevur ment, forritað og sniðgivið nýggju heimasíðuna.